# Pisurøða 2023

Góðan dag góðu pisur, foreldur, systkin, ommur og abbar, ja og øll tit avvarandi, ið eru komin at gleðast saman við okkum nýklaktu pisum.

Tað er mær ein heiður at standa á røðarapallinum her á Gøtusandi í dag. Tá eg bleiv spurdur um at halda pisurøðuna av Jan og Emi, so byrjaði eg beinanvegin at gera mær tankar um hvørji evni skuldi verða viðgjørd. Eg kom fram til, at eg vildi hava røðuna at verða í tráð við skúlagongdina her á Miðnámi á Kambsdali, so eg skrivaði hana í gjár.

Skúlin er sum ein varði, og hetta er ikki ein lýsing fyri fyritøkuna beint her uppi. Hóast vit eru ung, so hava vit longu lagt fleiri varðar; barnagarðurin, fólkaskúlin, ítrótturin og frítiðarítriv, sum hava verið við til at seta dám á okkara lívsleið og mynda okkum sum menniskju.

Fyri trimum árum síðani varð miðnámskúlin tann næsti varðin, ið vit skuldu laga. Her møttu vit nógvum nýggjum andlitum, og lógu tað spennandi avbjóðingar fyri framman. Hetta var ein nýggjur kapitull fyri okkum øll.

Teir fyrstu steinarnir í varðanum eru teir sterkastu og leggja grundarlagið fyri varðan. Hesir kunnu vit eisini nevna grundarsteinarnar. Hesir grundarsteinarnir kunnu verða

nógvir og kunnu verða ymiskir frá persóni til persón. Fyri mítt viðkomandi eru tað vinirnir og samanhaldið sum eru tann sterkasta grundin.

Eg minnist væl fyrsta dagin, tá ið vit øll stóðu í auluni, klár til at fara út í stovurnar. Eg visti hvørji fleiri vóru, men kendi ikki ordiliga nakran. Tað lá tá ein óvissa í luftini.

Persónliga var tað eisini ein málslig kollvelting. Orð sum “Well” og “byll” blivu skift út við ávikavist “liii” og “diii”. Hóast okkara ymiskleika, so var tað tó skjótt, at eg sá bjartskygni í hesum flokki av fólki, ið varð samlað saman hendan dagin í auluni.

Ímeðan eg havi sitið og fyrireikað hesa røðuna, havi eg hugt aftur á tey trý árini á Kambsdali.

Og eg má ásanna, at vit gloyma rættiliga skjótt.

Eg kom at hugsa um Teams, har vit høvdu fjarundirvísing, online tímar og hvussu lærarnir stríddust at halda “geistinum” uppi, ímeðan onkur okkara svav, spældi Fortnite ella FIFA. Eg minnist eisini, at tað onkuntíð hoyrdist róp í bakrundini og tað kundi koma fyri, at ein órelevant samtala bleiv yvirhoyrd, tí onkur hevði gloymt at “mute’a” mikrofonina. Sjálvur var eg ikki nakað frægari; tí einu ferðina tá babba kom oman í kamarið hjá mær fyri at spyrja um eg skuldi hava nakað til matna, sá hann bara Pól Esper undirvísa við høvdalagið, har hann líkasum tosaði fyri deyvum oyrum ímeðan eg lá og svav.

Jú Korona setti ein ávísan dám á okkara skúlaskeið, men tíbetur fingu vit vanliga skúlagongd aftur, so vit kundu njóta samveruna saman bæði í skúlanum og í frítíðini. Vit hava eisini upplivað inflatión, tey fáu árini vit hava gingið her. Tann eyðkendi og vælumtókti 20'arin, sum var prísurin fyri ein kaffikopp og eitt Sport bar bleiv til ein 22'ara. Hetta forðaði tó ikki fyri, at eg tók eina tvey krónu afturat við í skúlan.

Vit byggja á grundarsteinarnar.

Undirvísing, miðvíst arbeiði, stríðsvilji og langar nætur eru steinarnir, sum byggja varðan uppeftir móti toppinum, og samstundis móti málinum, sum vit hava sett okkum.

Tá vit hyggja aftur á hesar avbjóðandi løtur, so kunnu vit spyrja okkum sjálvi, vóru tær nú so truplar hóast alt? Ja sikkurt, men vit høvdu tó altíð tíð til ein kaffikopp, eitt lítið prát og kundu skemtast, tó at tað onkuntíð sá dapurt út. John Lennon segði tað so gott "Life is what happens when you're busy making other plans".

Nú er húgvan komin á høvdið og seinasti steinur er lagdur á varðan her á miðnámi. Gleðin er stór, og vit føla at vit kunnu mestsum alt. Sum Martin Joensen sigur í yrkingini, Morgun, "Heimurin fyri tær opin", vit hava nú nógvar møguleikar.

Systir mín hevur í nógv ár samlað uppá Gajol pakkar, og ikki tykkum at siga, so standa altíð onkur gullkorn á pakkunum. Í síðstu viku kom eg fram á hetta sitatið hjá Anders

Mathesen, ið stóð at lesa á einum av pakkunum:”Der er ikke noget, man skal. Der er valg, og så er der konsekvenser af disse”.

Nú standa vit her við alskyns møguleikum og valum, nógv fleiri enn omma og abbi, ja enntá fleiri møguleikar enn okkara foreldur høvdu, og tað er frá í dag av, at vit av álvara skulu velja. Hvat skal eg lesa til? Skal eg fara í læru? Skal eg fara at ferðast? Ella skal eg fara ”all in” við arbeiði, fyri at tjena mær nakrar krónur.

Valið er frítt, ella í øllum førum rættiliga nógv fríari enn nakrantíð áður. Valið, ið tú tekur nú kemur at hava ávirkan á tína framtíð, eisini sjálvt um valið ikki akkurát verður tað rætta og tú hálsar um og velur okkurt annað.

Tað kann tykjast sum ein byrða, at vit skulu vita í dag, hvat er best fyri okkum um 20, 30 ella 40 ár, men ein ”skeiv” avgerð nú, kann vísa seg at gerast ein signing í framtíðini, lagnunnar speisemi.

Danski heimspekingurin, Søren Kierkegaard, segði ”At váða er at missa fótafestið eina stund, ikki at váða er at missa seg sjálvan”. Latið okkum tí tora at taka nøkur val.

Góða kenslan, ið vit nú hava meðan vit standa her so vøkur í føroyskum klæðum ella flottum búnum við húgvuni á høvdinum, hon fer ongan veg. Hetta er okkara varði, og nú ræður um hjá okkum at fara út at byggja nýggjar varðar.

Gott flog góðu pisur.